VIÐMERKINGAR

Kærkomnar ósemjur

Viðmerking til grein í Sosialinum av Jóannes Ejdesgaard týsdagin 26. februar

Sámal Petur í Grund
landsstýrismaður

Vanligt plagar at vera, tá ósemjur taka seg upp, at ein ella annar tekur seg saman fyri at finna eina semju í málinum.

Sjálvdan havi eg hoyrt nakran fegnast um eina ósemju.

Men hetta upplivdu vit í Sosialinum týsdagin 26. februar. Jóannes Ejdesgaard heilsar ósemjuni um eina framtíðar eftirlønarskipan vælkomnari.

Um avgerð landsstýrismansins, ikki at leggja uppskotið fyri tingið í hesum valskeiði, sigur Jóannes Ejdesgaard, at hetta er skilabesta avgerð samgongan hevur tikið í langa tíð.

Eftirlønarskipan

Samgongan setti sær fyri, tá samgonguskjalið var skrivað, at lóggeva um eina eftirlønarskipan fyri arbeiðsmarknaðin.

At nakar í dag kann gleða seg um, at tað ikki eydnaðist at fremja hana í verki er undrunarvert. Ikki minst álvarsama undran vekir tað, at formaðurin í einum av teimum størru flokkunum kann gleða seg um at ikki var komið á mál.

Øll sum fáast eitt sindur við politik og samfelagsviðurskifti annars eiga at vera klár yvir, at vit longu nú eiga at leggja framtíðar eftirlønarviðurskifti til rættis.

Tað skal undra meg, um ikki samgongan sum skipa verður eftir valið fer at seta sær sama mál.

Samhaldsfesti

Í somu grein sigur Jóannes Ejdesgaard, at Tjóðveldisflokkurin vil hava eina samhaldsfasta skipan, meðan Sjálvstýrisflokkurin og Fólkaflokkurin vilja hava eina sokallaða Fólkatrygging, har hvør sætar sær, við egnari kapitaluppsparing.

Eg veit ikki hvar Jóannes hevur hetta frá, men tað er so ikki frá sjálvstýrisfólki og allarminst frá mær, sum havi sitið við lógaruppskotinum, síðani Helena Dam á Neystabø, fór úr sessinum sum landsstýrismaður.

Eg havi til eina og hvørja tíð fært fram, at Sjálvstýrisflokkurin ynskir eina skipan hvar samhaldsfesti til eina og hvørja tíð tryggjar øllum eina virðuliga eftirløn.

Spurningurin um stendur ósvaraður og sum er grundin til at ikki var komið á mál, er um tað útyvir samhaldsføstu skipanina skal vera møguligt hjá teimum sum ynskja tað, at spara meiri upp til eftirlønartíðarskeiði enn tað tvungna, og hvussu hetta skal vera møguligt.

Egineftirløn

Vit hava dømi í okkara egna landi um, at politiski mynduleikin hevur sett eina tvungna uppsparing í gildi.

Sjálvstýrisflokkurin ynskir at geva lønmóttakaranum møguleika til, útyvir eina samhaldsfasta skipan, at spara eyka upp til ellisárini.

Tað kann ikki vera rímuligt, at lønmóttakarin ikki hevur loyvi til sjálvur at avgera, um hann ynskir at nýta úrtøku sína nú, ella hann ynskir at goyma part av henni til hann av nátúrligum grundum fer av arbeiðsmarknaðinum.

Hetta kann gerast við eini egineftirlønarskipan.

Harafturat eigur at vera tikið til eftirtektar, at tað eru fleiri sum longu hava eina slíka skipan.

Eg havi ógvuliga trupult við at skilja, at nakar kann hava ilt av, at tað gerst møguligt, útyvir eina samhaldsfasta skipan, at prioritera ellisárini í tann mun ein sjálvur ynskir tað.

Framtíðin

Skulu okkara pensiónsviðurskifti í framtíðini vera sum tey eru nú, so er vandi fyri at pensiónirnar aftur vera afturútsigldar.

Einasta loysn, sum kann vinna frama politiskt í løgtinginum, sær út til at vera ein loysn hvar samhaldsfesti og individuel uppsparing eru samantvinnaði. Hetta var tað samgongan arbeiddi við.

Persónliga meini eg harumframt, at hesi viðurskifti eiga at liggja uttanfyri landskassan, so at pensiónirnar ikki vera fyri hóttafalli í einum lákonjukturi, so sum tað hendi fyrst í nítiárunum.

Her kundi verið passandi, at samhaldsfasti var ein partur av skipanini.

Ferðamannasiglingin undir Vestmannabjørgini og fuglurin

Bergur Olsen

Í Dimmalætting 31. januar sigur Bjarki Skúvdal sína meining um siglingina við ferðafólki undir Vestmannabjørgini og ávirkanina á fuglin. Orsøkin var ein stubbi, sum var sendur í Degi og viku, eftir at Vinnumálastýrið og Ferðamannaráðið høvdu havt ein evnisdag um økismenning og burðardygga ferðavinnu, har eg helt, at siglingin undir Vestmannabjørgini neyvan var burðardygg.

Bjarki, sum hevur siglt undir Vestmannabjørgini við ferðafólki í nógv ár, metir ikki, at siglingin ávirkar fuglin. Hann metir, at fuglurin, sum er minkaður nógv seinastu árini í Vestmannabjørgunum, fer ikki at økjast munandi, fyrr enn fult er í teimum góðu støðunum sunnanfyri.

Eitt mark er fyri, hvussu nógv fuglurin tolir

Eg haldi haraftuímóti, at tað er eitt mark fyri, hvussu nógva sigling fuglurin tolir, og eg eri bangin fyri, at siglingin undir Vestmannabjørgini við ferðafólki hevur verið oman fyri hetta mark í nógv ár. Tað er tó sera torført at prógva at so er, tí náttúrligar broytingar fara alla tíðina fram í fuglastovnunum, og tað er torført at siga, hvørjar broytingar koma av ferðavinnuni, og hvørjar eru náttúrligar, men um fuglurin fyrst er rýmdur úr einum bergi, kunnu vit ikki bøta tað aftur. Tí haldi eg, at vit eiga at vera sera varin og seta reglur fyri, hvussu ferðavinnan kann bera seg at undir bjørgunum.

Vinnumálastýrið vil fleirfalda ferðavinnuna

Vinnumálastýrið hevur við Ferðaráð Føroya sett sær sum mál at fleirfalda ferðavinnuna á einum burðardyggum grundarlagi. Av tí at ferðafólk oftast koma fyri at uppliva náttúruna, er neyðugt, at ferðavinnan ikki spillir náttúruna, um vinnan skal vera burðardygg. Onga aðra staðni er so nógv ferðsla, sum undir Vestmannabjørgunum, men siglt verður t.d. eisini við ferðafólki undir Hestoynna, Nólsoynna, Sandoynna, Skúvoynna, Enniberg, Mykines, Sørvágsbjørgini og St. Dímun. Fáa staðni ber tó til at sigla so nær, sum undir Vestmannabjørgunum, men kortini er tað allastaðni vandi fyri at órógva fuglin, og má hetta havast í huga, tá ið hugsað verður um at økja ferðavinnuna. Ein máti at verja bjargafuglin er, at seta eitt mark fyri, hvussu nær loyvt er at sigla, meðan fuglurin er í berginum. Ymiskt er hvussu onnur lond hava sett hetta markið. Í Canada er t.d. ikki loyvt at sigla nærri enn 100 m frá lomvigabjørgum, undir summum grønlendskum bjørgum er markið 500 m, í Ruslandi 1000 m og í USA 100-1600 m. Eitt slíkt mark kundi verið sett uttan um lomvigabjørgini, frá tí at lomvigan byrjar at verpa mitt í mai, til pisurnar eru farnar fyrst í august.

Tann ungi fuglurin fær ikki frið

Tað, sum eg eri mest bangin fyri í sambandi við ferðamannasigling undir bjørgunum, er, at tann ungi fuglurin, sum liggur á sjónum undir bjørgunum og situr á helluni undir bjørgunum, ikki fær frið, men alla tíðina verður rikin út frá. Hetta er fuglur, sum er 2-4 ára gamal og skal taka við og verpa sum 5 ára gamal. Hesi árini nýtur hann at kunna seg við bergið og finna sær ein maka. Hesin fuglur ferðast eisini ímillum bjørgini, og finnur hann eitt pláss, har betur friðar er, so verður hann verandi har. Tá ið ein er undir Vestmannabjørgunum, sæst lítið av fugli á sjónum, men hann tykist at vera spakur, og kortini fer hann út frá landi. Havast skal eisini í huga, at vit síggja bert tann spaka fuglin – ikki tann fuglin, sum møguliga er rýmdur. Av tí at hesin fuglur bert heldur til undir bjørgunum í eini tvey ár venist hann ikki við bátarnar frá ár til ár.

Riturnar eru minkaðar enn meira í tali enn lomvigurnar

Riturnar eru minkaðar enn meira í tali enn lomvigurnar, men tær eru vanliga ikki so staðbundnar sum lomvigurnar, og náttúrligar broytingar í ritustovninum eru ofta størri enn í lomvigastovninum. Tað er tó ikki óhugsandi, at ferðavinnan eisini her hevur skundað undir minkingina.

Fyrr var nógvur fuglur undir Vestmannabjørgunum

Fyrr var nógvur fuglur eystur undir landi og til bar at reka lomvigurnar, sum lógu inni á Seyðskorargjógv upp á land. Gjógvin endar við einum holi har urð er innast á botninum, og við tveimum tí fýra bátum bar til at reka ein part af lomvigunum upp í urðina, har tær vórðu tiknar. Hetta kundi bara gerast í allar besta veðri og ymiskt var, hvussu nógv kom burtur úr, men vanligt var, at teir fingu einar 50-200 fuglar ein rakstur, og teir kundu reka nakrar ferðir hvønn dag. Tann besta dagin fingu teir um 5.000 lomvigur til samans. Síðani seinast í 1950 árunum er fuglurin minkaður og fyrst í 1960 árunum góvust teir at reka upp á gjónna. Fuglurin helt tó fram við at minka, og í 1972 sendu vestmenningar skriv til Løgtingið um at friða lomviguna móti allari veiðu á sumri. Tað gingu tó 8 ár, áðrenn nøkur friðing kom í lag. Minkingin hevur tó hildið fram í Vestmannabjørgunum øll hesi árini (sí mynd), og ongi tekin eru um nakran bata, hóast framgongd hevur verið í Høvdanum á Skúvoynni seinastu 10 árini (sí mynd). Spurningurin er tí, um ikki eisini ein framgongd kundi havt verið í Vestmannabjørgunum, um tey høvdu fingið líka góðan frið, sum Skúvoyarbjørgini. Hetta er sjálvandi torført at meta um, tí tað kunnu vera aðrar orsøkir til hendan munin, t.d. at meira føði er sunnanfyri enn norðanfyri. Um so er, at tær náttúrligu umstøðurnar eru verri norðanfyri enn sunnanfyri, so skal enn minni til, áðrenn ferðamannasiglingin árógvar fuglin so nógv, at hann flytir.

Hvør hevur rættin at sigla við ferðafólki undir bjørgunum?

Á landi eru ognarviðurskiftini sum oftast greið. Bjørgini eru vanliga býtt ímillum ognarmenninar í bygdini, sum bjørgini hoyra til, og ikki er loyvt at fara í land uttan loyvi frá eigarunum. Men hvør eigur rættin til at sigla við ferðafólki undir bjørgunum? Skulu tað vera teir, sum eiga bjørgini, fólk úr bygdini/kommununi har bjørgini hoyra til, ella skulu øll kunna sigla sum higartil? Hetta er ein frí vinna, har ongin avmarking er av nøkrum slag. Øll kunnu sigla við ferðafólki, sum hava góðkendan bát og manning. Fyri fuglin hevur hetta ongan týdnig, bara tað eru greiðar reglur, sum verja fuglin undir øllum umstøðum, men sum nú er, eru ongar reglur fyri, hvussu nær ein kann sigla, ella hvussu leingi ein kann vera undir bjørgunum, og vit kunnu bert ímynda okkum, hvussu skilið verður, um ferðavinnan verður fleirfaldað, sum ætlanin er, og frí kapping verður um tilboðini um sigling undir bjørgunum.

Niðurstøða

Skal ferðavinnan vera burðardygg og byggja á ta óspiltu náttúruna, er umráðandi, at reglur verða gjørdar, so ferðafólkini ikki eru við til at spilla náttúruna. Tann útferðin, sum flestu ferðafólkini fara í sambandi við fugl, er undir Vestmannabjørgini, og hendan vinnan lýkur neyvan slík krøv. Her mugu eisini greiðar reglur setast fyri, hvør skal seta krøvini, og hvør skal hava eftirlitið.

VIÐMERKINGAR

5000 føroyingar í útlegd - men landsstýrið vil hava útlendingar.

Kári Petersen
Valevni javnaðarfloksins í Suðurstreymoy

Seinastu vikurnar hevur ein undrandi kunna sæð, at landsstýrið hevur gjørt alt hugsandi, serliga viðvíkjandi yvirtøkum av útlendingamálum, fyri at tryggja at føroyska vinnulívið fær útlendska arbeiðsmegi.

7000 føroyingar fóru av landinum, bert 2000 eru afturkomnir.

Tað undarliga í hesum er, at vit uttanlands eiga meir enn 5000 føroyingar. 7200 føroyingar fóru av landinum í 90árunum, men bert 2000 eru heimafturkomin (Sí talvu). Hetta merkir, at 5000 føroyingar nú liva í útlondum, fyrst og fremst í Danmark. Nógvar familjur vóru sundurskildar í 90-árunum. Oftast var tað yngra ættarliðið, sum endaði í Danmark. Nøkur av hesum eru fallin til í Danmark, og nógv skal til, áðrenn tey velja at koma heimaftur. Men tey flestu, sum eg sjálvur kenni, høvdu vent heimaftur, um umstøðurnar høvdu verið eitt sindur øðrvísi.

Landsstýrið hevur avskrivað føroyingar í útlegd. Landsstýrið átti langt síðani at gjørt eina kanning av, hvat skal til fyri at hjálpa føroyingum í útlegd at flyta heimaftur. Av tí at landsstýrið hevur valt ikki at kanna, hvat skal til fyri at fáa hesi fólk heimaftur, skal eg við hesum royna at lýsa, hvørji viðurskifti skulu fáast í rættlag fyri at fáa føroyingar í útlegd heimaftur.

Ynski nr. 1:
Eitt (áhugavert) arbeiði

Nakrar av orsøkunum kenna vit. Tað sum hevur mest at týða er at fáa eitt arbeiði, og helst at fáa eitt áhugavert arbeiði. Hetta landsstýrið hugsar framvegis bara í fiski, og lítið og onki hevur verið gjørt fyri at hjálpa øðrum vinnum í gongd. Ein av trupulleikunum av at hava eitt so einsháttað vinnulív er nevniliga, at tað verða so fá áhugaverd arbeiði. Hetta landsstýrið hevur so einki gjørt fyri at útvega Føroyum eitt meira fjøltáttað vinnulív.

Ynski nr. 2:
Ein bústað til yvirkomiligan prís

Ein annar trupulleiki er, at sethús í Havn ikki fáast fyri minni enn 1,5 mió. kr., ofta fer prísurin upp í móti tveimum milliónum. Skal ein byggja hús í Havn er torført at fáa tey upp fyri minni enn 1,5 mió. kr. tá er grundøkið íroknað. Um ein skyldar 1,5 millión skal unga húskið gjalda millum 11 og 12 túsund um mánaðin. Eingin eigur at undrast yvir at fólk setast aftur í útlondum, heldur enn at átaka sær skuld fyri 1,5 til 2 milliónir krónur, bert fyri at fáa tak yvir høvdið.

Í øðrum londum ber til at keypa góðar íbúðir fyri 7-800.000 kr., so fólk ikki noyðast at spenna seg so hart fyri, at tey aldri fáa notið lívið. Hetta hevði eisini borið til í Føroyum, men landsstýrið hevur valt einki at gera við íbúðarpolitikkin. Sitandi landsstýri hevur snøgt sagt als ongan íbúðarpolitikk havt hesi fýra árini.

Ynski nr. 3:
Ansingarpláss o.s.fr.

Fleiri orsøkir kunnu nevnast. Ein sum ofta verður nevnd, er at sjálvt um tað er lætt at fáa arbeiði, eru nógv sum setast aftur, um eingi vissa er fyri barnaansingarplássi. Uttan ansingarpláss kann familjan ikki vinna tvær inntøkur. Uttan tvær inntøkur ber als ikki til at flyta til Føroyar, tí uttan tvær inntøkur ber als ikki til at keypa hús. Barnafamiljurnar, sum ynskja at koma heimaftur, vilja hava trygd fyri góðum umstøðum fyri eina heila familju. Nøkur nevna frítíðartilboð til ung, til dømis musikkskúla oa. Fleiri onnur viðurskifti hava týdning, og hvussu nógv tey ymsu viðurskiftini hava at týða, er lætt at finna fram til við einari skjótari kanning.

Javnaðarflokkurin vil arbeiða fyrst at fáa teir føroyingar heimaftur, sum uttan at vilja tað sjálvir, eru endaðir í útlondum. Í fyrsta lagi hevði javnaðarflokkurin kannað, hvørjar umstøður forða føroyingum í at koma heimaftur, og síðan hevði javnaðarflokkurin farið í gongd við at bøta um tær umstøður, (t.d. um tær eru sum nevndar omanfyri), fyri at viðvirka til, at so nógvir føroyingar sum møguligt kunnu búgva í egnum landi.

Fólkaflyting 1989–2001

Nettotilflyting: Flutt til Føroya minus flutt úr Føroyum

1987	236
1988	268
1989	– 371
1990	– 1017
1991	– 599
1992	– 883
1993	– 1821
1994	– 1923
1995	– 584
1996	143
1997	217
1998	305
1999	365
2000	450
2001	550

2001: Mett av Hagstovuni

Flyting tilsamans:

1989 – 1995	–7198
1996 – 2001	2030
1989 – 2001	–5168

Kelda: Hagtíðindi

Fremmandar lærur í Føroyum

Hans Birgir Hansen

Eg eri ógvuliga hart ímóti øllum fremmandum lærum, innanfyri barnagarðar, skúlar og lærustovnar í landinum og í Havn, ið hava við børn, ungdóm og tilkomin at gera.

Tað er tá børn, ungdómar og tilkomin verða sammett við rottur á ransóknarstovum á universitetum, ið er fyrimyndin fyri uppaling og frálæru innan áðurnevnda.

Tað er talan um pedagogik, psykologi, psykiatri, ið ikki viðgerð børn, ungdóm og tilkomin í viðgerðum um landi og í Havn, sum ein menniskjaligan skapning.

Tað er øll hendan áhaldandi fjøtran, heiladálkan, vaskan, indoktrineran av sinnalagnum, ið órógvar heilasamskifti hjá børnum, ungdómum og tilkomnum aðrastaðni.

Tað er avgerandi neyðugt at fáa steðga allari fjøtran, heiladálkan, vaskan, indoktrineran av sinnalagnum, ið eingin av teimum tørvar um landi og í Havn.

Tað eru hesar fremmandu lærur, pedagogar, psykologar, psykiatrarar og lærarar við sernámsdepilin, ið oyðileggja lívið hjá børnum, ungdómum og tilkomnum.

Tað kann skapast friðarlig framferð allastaðni, sleppa vit okkum av við fremmandu lærurnar, og hesi fólkini, vit hava í barnagørðunum, skúlunum og lærustovnunum.

Tað geldur ikki minst avvenjingarheim, psykiatriskar deildir og viðgerðarstovnar, sum vit hava í Havn/Suðurstreymoy, ið ein er ógvuliga hart ímóti.

Tað er eingin av øllum hesum, ið hava uppiborið at fáa eina ómenniskjaliga viðferð innan fyri áðurnevnda. Hetta skulu øll gera sær greitt í dag.

Tað eru øll tey væletableraðu í samfelagsskipanum, ið hava skipað fyri, at nógv vera burturgoymd við hjálp av dómsvaldi, ákæruvaldi og politivaldi.

Eg havi áður livað ímillum slík medmenniskju á psykiatriskum deildum bæði niðri og heima.

…men eitt er fyri neyðini

Petur Simonsen

Við valið í 98 talaði fólkið greitt: eitt er fyri neyðini fram um alt annað – tey ríkisrættarligu viðurskiftini skulu broytast. Búskaparligi og politiski ruðuleikin í 90-unum hevði fest seg í sinnið. Framyvir skuldu ábyrgd og avgerðir fylgjast hond í hond.

Sitandi samgonga skilti boðskapin. Hon setti út í kortið eina skipaða tilgongd móti fullveldi. Hendan ætlan, sum var ein trygg leið bæði fyri føroyingar og danir, fekk óváentaða mótstøðu frá dønum vælstuðlaðir av andstøðuni í Løgtinginum.

Hetta, at andstøðan, og ikki minst Javnaðarflokkurin, ikki vildi viðurkenna ynski veljaranna við valið í 98 og tí nærum gjørdust samstarvspartur hjá donsku stjørnuni, gjørdi sítt til, at danska stjórnin í fyrsta lagi slapp væl frá sini harrendu støðu. Í staðin fyri samráðingar varð talan um diktat, og spælt varð við vøddunum.

Føroyskt góðvarni

Vanliga føroyska góðvarni dumpaði so rudduliga. Vit, sum trúðu, at ein mentað og fólkaræðislig tjóð fór at vísa einari skipaðari tilgongd móti stórri sjálvsábyrgd á fíggjarliga og politiska økinum áhuga og stuðul, fóru heilt skeiv.

Primitivi leisturin, at tann sterkari altið hevur rætt, var nýttur á ein snildisligan hátt, soleiðis at sjálvt pressan ikki gav sær stórvegis far um, hvat veruliga fór fram. Og longu undir fyrstu samráðingunum byrjaði ein dystur í miðlunum. Ein dystur, har føroyingar ikki fingu fótin fyri seg. Miðlarnir vóru á hegnisligan hátt nýttir til at gera til láturs rekavættini og biddararnar úr Føroyum. Endamálið var greitt. Fólkahugsanin í Danmørk og í Føroyum skuldi ávirkast, so samgongan kom undir trýst.

Fólkahugsanin broyttist helst eisini, og tíverri ikki bara hon. Samgongan misti stevið, og spjaðing kom í. Málið var nátt …soleiðisnar… tí kósin bleiv ikki hildin.

Kósin sett av nýggjum, men málið hitt sama !?

Hóast stungið er út í kortið av nýggjum og kósin er rættað til, so er málið vónandi ongantíð farið úr eygsjón. Ósemjan í samgonguni á hesum øki hevur alment meira verið um, hvussu skjótt skal siglast. Men samgongan hevur tó higartil hildið fast við setningin, at eitt er fyri neyðini meir enn alt annað – fullveldismálið. Øll onnur viðurskifti eru bæði umráðandi og neyðug, men hetta eina er meira neyðugt enn alt annað í dagsins politikki – fullveldismálið og tann tilgongd, sum byrjaði við hesi samgonguni.

Hóast ikki so nógv er komið burtur úr á sjálvstýrisleið, sum ynskiligt er, so er kortini sjøtil og væl tað settur á. Tí ræður um, at hendan tilgongdin heldur fram í komandi valskeiði.

Vælferðin – mín og tín ábyrgd

Tá fört verður fram, at lítið og onki er gjørt á øðrum økjum, so er tað ikki satt. Neyvan nakrantíð er so nógv lagt í at loysa onnur samfelagsmál sum júst hesi seinastu fýra árini. Sjálvsagt er nógv, sum bæði eg og onnur kundu ynskt var øðrvísi. Og nær fer tað ikki at vera tað? Men tá útreiðslurnar eitt nú til almanna- og heilsumál er øktar við umleið 30%, útbúgving og gransking við góðum 40% og samferðslu og samskiftisøki við 100%, so er talan um veruligar ábøtur og framstig. Og hetta er framt, hóast at blokkurin partvíst er lagdur til síðis og nú í seinastuni er minkaður við umleið 35%.

Fulveldiskósin er fyritreytin fyri framhaldandi skynsomum vælferðarpolitikki. Einum vælferðarpolitikki, sum er grundaður á egnar fyritreytir, sum ikki er tengdur at peningarensli úr Danmark og sum ikki má ella skal verða kastibløka í einum yvirbjóðingarpolitikki upp undir val. - Tað er vælferðin hjá tær og mær ov týdningarmikil til.

Gott, at so nógv tá sannaðu, at eitt er fyri neyðini ... Ivist ikki í, at vit verða enn fleiri 30. apríl komandi.